

*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Harry Potter á føroyskum nærkast

Um einar tvær vikur kemur sætta bókin á føroyskum um Harry Potter í bókabúðirnar. Føroyska týðingin hevur heitið *Harry Potter og Hálvblóðsprinsurin* og er slakar 600 blaðsíður. Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags sum gevur út.

Føroyska upplagið hesa ferð er 1500 bøkur, sum er nógv fyri eina barnabók. Fyrstu fýra bøkurnar um Harry Potter eru prentaðar í 2000 eintøkum. Fyrsta upplagið av fyrstu bók varð útselt, og stutt eftir varð bókin prentað uppaftur í 1000 eintøkum afturat. Fyrstu tríggjar bøkurnar týddi Gunnar Hoydal, ta fjórðu Malan Háberg, og fimtu og sættu bók hevur Bergur Rasmussen týtt.

Sætta bókin um Harry Potter fer fram í sætta skúlaári hansara á Hogwarts. Og skúlaárið fær eina óvanliga byrjan, nú tað rennur saman millum heimarnir hjá muglarum og gandafólkum ... J.K. Rowling sigur sum vant hegnisliga og hugtakandi frá teimum ævintýrum, Harry Potter og vinfólk hansara eru fyri. Bøkurnar um Harry Potter halda fram at seta met. Allar seks eru seldar í 300 mió. eintøkum um allan heim, á 63 málum og í 200 landaøkjum. Í Danmark er seinasta bókin um Harry Potter prentað í 120.000 eintøkum, og er hetta eitt ógvuliga stórt upplag.

Nær sjeynda og seinasta bókin kemur út er tað eingin, ið veit, uttan J.K. Rowling kanska....

*Tað er*



*Bergur Rasmussen, sum týðir sættu Harry Potter bókina, ið verður í bókabúðunum um einar tvær vikur*

# Bøkurnar og eg



*At lesa Dostojevskij er næstan sum at lesa í Bíbliuni, heldur Marjun Bæk. Tú varnast altíð okkurt nýtt …*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Marjun Bæk, prestur**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- Lesi beint nú *Dværgenes dans* eftir Anne Marie Løn. Tað var mest av tilvild, eg rendi meg í hesa bókina, men kenni rithøvundan frá øðrum bókum, t.d. *Traktørstedet* og *Café Danmark* o.ø. Eg haldi hetta vera lívsjáttandi skaldsøgur um fólk, sum ikki koma til skorin klæði, og sum síggja lívið úr sínum serliga sjónarhorni og liva tað. Annars lesi eg mest krimisøgur: Liza Marklund, P.D. James, Henning Mankell, Minette Walters, Kirsten Holst, Anne Holt o.a.. Dan Brown var sjálvandi ikki til at koma uttanum, men eg haldi nú, hann var nakað langrøkjutur - sum fleiri aðrir amerikanskir rithøvundar. *Mikkjalsbók* og *Mál og mæti* liggja eisini frammi í løtuni til at kveita í afturvið einum kaffimunni.

Fakliga hevur tað í seinastuni mest verið kjakbøkur um fólkakirkjuna, t.d. Jan Lindhardt, *Folke*kirke?. Og so havi eg lisið um eina kristna sekt, valentianarar, úr 2.øld, sum gingu so høgt upp í Jesu guddómleika, at teir m.a. funnu tað fyri gott at gera lærusetningar um, at einki av tí, sum Jesus át ella drakk, fór út úr kroppinum aftur!

Meðan eg hevði tað gleði at vera fulltíðar-omma í einar 14 dagar herfyri las eg millum annað *Físan*, *Apan Ásvald*, *Storm Stina*, *Álvur Ákason* osfr.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- Tað eru fleiri - ilt at taka dagar ímillum. Ein tann fyrsta, og sum eg aldrin gloymi, var *Vredens druer* hjá John Steinbeck, sum eg las, áðrenn eg varð konfirmerað. Serliga var ein partur móti endanum, sum festi seg fyri altíð, har ein kona, sum beint hevði mist bróstabarn sítt, gav einum lívshættisliga útsvøltaðum manni bróst. Danin Jørgen Thorgaard hevur skrivað *En god dag*, sum eg las beint aftaná *Angelas Aske,* tað var sanniliga munur á dýpdini! Tú gloymir heldur aldrin *Ditte menneskebarn* ella *Pelle Erobreren*, og Dostojevskij er næstan sum at lesa í bíbliuni: Tú varnast altíð okkurt nýtt.

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
- Tey hava sagt mær, at eg var lítil, tá eg hart og týðiliga (við føroyskari úttalu, sjálvandi!) las av eini pappeskju: PALL MALL FAMOUS CIGARETTES! Tað minnist eg nú ikki. Men eg minnist, at eg las eina roman í trimum pørtum í Ude og Hjemme uml. 12 ára gomul. Eg veit ikki, hvat hon var um, men har var ein ketta, sum æt Richo, og síðan itu allar kettur heima hjá okkum Richo. Frensurin hjá systir míni eitur framvegis Richo.

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
- Nú um dagarnar skuldi tað vist verið Harry Potter, men tær freista meg ikki. Eg havi sæð onkran av filmunum og skilji væl, at tey ungu eru upptikin av bókunum. Men eg eri helst vorðin ov gomul til tær. *Ringanna Harri* hevur tó so nógv religiøs motivir, at tað er góður lesnaður hjá mær, men tá eg var og hugdi at tí fyrsta filminum, sovnaði eg ...

Eg vildi ynskt, at eg hevði sans fyri at lesa yrkingar, men tað tími eg av einhvørji orsøk ikki. Mær dámar harafturímóti at *hoyra* yrkingar, men tað er tað jú ár og dagur ímillum.

*Hvat fær teg at velja tær bøkur, tú lesur?*
- Ofta er tað eitt ummæli í bløðum ella á netinum, um eg væl at merkja kenni ummælaran og havi álit á honum. Ella viðmæli frá vinum og kenningum. Tað er í øllum førum ikki myndin á permuni!

## Royn teg sum ummælara

Hvørja viku fram til jóla fer Bókasølan at luta eitt gávukort burtur áljóðandi 300,00 kr
Tey, sum hava hug at vera við í kappingini, skulu skriva eitt ummæli av eina bók, sum er at finna á heimasíðuni hjá Bókasøluni, www.bokasolan.fo
Ummælið nýtist ikki at vera langt, tað veldst ikki um longd, men heldur um góðsku. Tað verður onkuntíð sagt, at eitt gott ummæli kann skrivast við 200 orðum. Ummælið skal vera sakligt, og kann verða lagt út á heimasíðuna hjá Bókasøluni til onnur at lesa. Tú kann eisini geva bókini karakter: besti karakterur er 6 stjørnur, og tann vánaligasti er ein stjørna.
Soleiðis gert tú fyri at verða við í kappingini:
**1)** Finn bókina fram við leitiskipanini á heimasíðuni.
**2)** Trýast á slóðina: ”Skriva ummæli”
**3)** Eitt skema kemur á skíggjan, har tú skrivar ummælið í.
Fyri at tað skal vera lætt, greitt og skjótt hjá Bókasøluni at handa vinningarnar til røttu vinnararnar er sjálvandi neyðugt eisini at skriva fornavn, eftirnavn, bústað, - og helst eisini telefonnummar og teldupostadressu.
Síðini er bara at trýsta á slóðina ”Send til Bókasøluna”, og tú ert við í lutakastinum.
Er okkurt ivamál, kanst tú senda Bókasøluni ein teldupost á bokasolan@bokasolan.fo og tey svara skjótast gjørligt.
*Nú fáa øll høvi at royna seg sum*




*ummælarar á www.bokasolan.fo og samstundis verða við í lutakasti um gávukort*

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo